## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og møguliga sirm ella mjørki av og á, men eisini sólglottar. Hitin milum 15 og18 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av suðri og landsynningi, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 17 og 20 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 16 og 20 stig.

# Potter er allastaðni

**Harry Potter-áhugin er størri enn nakrantíð. Og nú koyrir maskinan aftur, tí greitt er, hvussu tann sætta bókin í Harry Potter-røðini kemur at eita**

POTTURIN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



Rithøvundin J. K. Rowling hevur lyft slørið, og nýggja bókin kemur á enskum at eita »Harry Potter and the Half Blood Prince«.

Sagt verður, at heitið á bókini hvørki vísir til Harry Potter sjálvan ella Voldemort, hansara fígginda.

### Tann vælumtókti Potter

Harry Potter-bøkurnar og filmarnir eru sera væl umtóktir, eisini her í Føroyum. Men serliga á alnótini er nógv vitan at finna um pottin mikla. Skriva »Harry Potter« inn í Google-leitimaskinuna, og tú fært milliónir av úrslitum.

### Tann óndi Potter

Men alt er ikki av tí góða um Potter. Tú kanst finna eitt Harry Potter-spæl á alnótini, sum er væl spælt. Fleiri fólk eru eftir spælinum, men tað er ikki altíð, at tey fáa fatur á rætta endanum. Ístaðin fáa tey fatur á harra Netsky.P, sum er ein virus, ið oyðileggur tær telduna. So verið varin, tá ið tit fara á Potter-jakt. Nýggja bókin skuldi tó ongan skaða gjørt.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 18 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 24 |
| Tromsø | 18 |
| Bergen | 20 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 29 |
| Malorca | – |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1020 hPa. eystan fyri Ísland fer norðureftir og viknar. Eitt lágtrýst, 997 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og grynnist.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum leygarnáttina. Tropiska ódnin »ALEX« á 47N-43V fer í landnyrðing eystan.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/08 kl. 06⁰⁰–05/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,7°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 04/08 kl. 06⁰⁰–05/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 10,9 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI




Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin næstur jørðini
31. juli: Fullmáni
7. aug.: Seinna kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. aug | 11.49 | — | 10.49 | 23.24 | 11.04 | 23.39 | 01.28 | 13.49 | 02.28 | 14.49 |
| 7. aug | 00.24 | 12.59 | 11.59 | — | - | 12.14 | 02.24 | 14.59 | 03.24 | 15.59 |
| 8. aug | 01.34 | 14.09 | 00.34 | 13.09 | 00.49 | 13.24 | 03.34 | 16.09 | 04.34 | 17.09 |
| 9. aug | 02.32 | 14.56 | 01.32 | 13.56 | 01.47 | 14.11 | 04.32 | 16.56 | 05.32 | 17.56 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. aug | 10.04 | 22.39 | 09.04 | 21.39 | — | 12.04 | 00.43 | 13.04 | 11.34 | — | 00.28 | 12.49 |
| 7. aug | 11.14 | 23.49 | 10.14 | 22.49 | 00.39 | 13.14 | 01.39 | 14.14 | 00.09 | 12.44 | 01.24 | 13.59 |
| 8. aug | — | 12.24 | 11.24 | 23.47 | 01.49 | 14.24 | 02.49 | 15.24 | 01.19 | 13.54 | 02.34 | 15.09 |
| 9. aug | 00.47 | 13.11 | — | 12.11 | 02.47 | 15.11 | 03.47 | 16.11 | 02.17 | 14.41 | 03.32 | 15.56 |

5 707265 100050 >